## Úrslit um vikuskiftið

**Meistaradeild kvinnur**

| | |
|---|---|
| TB-Mjølnir | 3-2 (11-25, 25-21, 25-17, 23-25, 15-8) |
| Dráttur-ÍF | 3-2 (17-25, 25-19, 11-25, 25-17, 15-6) |
| KÍF-Fleyr | 3-0 (25-15, 25-19, 25-22) |

**Meistaradeild menn**

| | |
|---|---|
| SÍ-ÍF | 0-3 (15-25, 20-25, 17-25) |
| Fram-Fleyr | 3-0 (26-24, 25-17, 25-18) |

TB-Mjølnir 3-2 (11-25, 25-21, 25-17, 23-25, 15-8):

# TB vann upp á álopsspælið

**Í oddadystinum í Trongisvági fekk TB harðastu mótstøðuna á árinum frá Mjølnir, ið tó ikki kláraði at fylgja við allan vegin**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

At kvinnurnar hjá Mjølnir vóru fult uppsettar til dystin móti, vístu tær frá fyrstu løtu, tí TB fekk á heimavølli av at vita í fyrsta settinum.

Alt bar til hjá Mjølnir og einki hjá TB, og tá avtornaði hevði Mjølnir lagt seg á odda 1-0 við settúrslitinum 25-11.

Sovorðna mótstøðu hevði TB ikki fingið á heimavølli fyrr í ár, og tað var ikki sørt, at fjáltur kom á bæði spælararnar og hini rundan um liðið.

Men í øðrum setti kom TB betur við og byrjaði við at leggja seg á odda 6-0. Mjølnir svaraði tó aftur, og skjótt stóð á jøvnum 7-7.

Síðani fylgdust liðini uppeftir, men í síðsta enda fekk TB meira burturúr, og í avgerandi løtuni eydnaðist at vinna settið 25-21.

Í triðja settinum vóru tær hjá TB blivnar heilt tryggar í spælinum og vunnu 25-17. Serliga var tað álopsspælið, ið nú var komið upp á pláss, og tá kunnu fægstu lið í landinum vænta sær at gera tað stóra við TB.

Roynda manningin hjá Mjølnir skal kortini ongantíð avskrivast, og tað vísti seg eisini í fjórða setti.

Liðini fylgdust uppeftir, men hóast TB var liðið, ið alla tíðina var eitt vet frammanfyri, spældi Mjølnir sterkt á gólvinum og fekk vent settinum móti endanum.

TB megnaði ikki at halda fast við góða álopið frá settinum frammanundan, og tá kanska nervar at enda eisini komu uppí, helt Mjølnir tørn og vann 25-23.

Nú skuldi alt avgerast í fimta settinum, men her skuldi tað vísa seg, at TB-kvinnurnar høvdu størru orkuna, meðan kreftirnar hjá Mjølnir fóru at ganga undan eftir tey fýra hørðu settini frammanundan.

Tí gjørdist tað ein sannførandi 15-8 sigur til TB í avgerandi settinum, og sostatt rakk tað eisini til 3-2 sigurin, ið ger, at TB nú er einsamalt oddalið við 12 stigum fyri sínar sjey dystir, framman fyri ÍF og Mjølnir, ið hava ávikavist 10 og 8 stig.

Dráttur-ÍF 3-2 (17-25, 25-19, 11-25, 25-17, 15-6)

# ÍF dragnaði

**Dráttur vísti, at tær eisini vilja verða partur í heiðursmerkjastríðnum, tá tær vunnu heimadystin móti ÍF**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Higartil í kappingini hava tað fyri tað mesta verið trý lið, sum tosað hevur um, tá talan hevur verið um heiðursmerkjakandidatar. TB, Mjølnir og ÍF høvdu fram til hetta vikuskiftið býtt stigini sínamillum í innanhýsis dystum sínum, og so høvdu tey bara tikið alt, tá talan var um dystir móti Drátti, KÍF og Fleyr.

Dráttur hava tó fleiri ferðir víst, at tær kunnu koma heilt nær, um lagið er tað rætta, og tað var tað sunnudagin. ÍF var á vitjan á Giljanesi, og eftir ein harðan dyst, sum gekk út í fimm sett, eydnaðist tað heimaliðnum at knógva ÍF.

Fyri Drátt merkir sigurin sjálvandi fyrst og fremst, at tær nærkaðust ÍF á triðjaplássinum, men sálarligi týdningurin av sigrinum man vera nógv størri enn so. Eftir at tað fleiri ferðir hevur verið nær við, fekk Dráttur hesa ferð prógvað, at tær væl kunnu vera við, har sum tað hendir, og fyri kappingina er tað bara at frøast um, at talan nú tykist vera um enn eitt lið, sum er ført fyri at blanda seg í oddinum.

Fyri ÍF merkti tapið hinvegin, at tær dragnaðu eitt fitt petti í mun til oddaliðið av Tvøroyri. ÍF er annars einasta lið, sum higartil hevur megnað at bast TB. Tað gjørdu tær í fyrsta umfarinum, og komandi vikuskifti fæst sjón fyri søgn, hvørt talan tá bert var um upplop, ella um ÍF veruliga hevur evnini til at leggja seg út í oddastríðið.

KÍF-Fleyr 3-0 (25-15, 25-19, 25-22)

# Fyrstu stigini

**Eftir fleiri góð avrik fekk KÍF sunnudagin síni fyrstu stig nakran tíð í meistaradeildini, tá tær vunnu grannauppgerðina ímóti Fleyr**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

KÍF er ikki longur niðasta liðið í meistaradeildini hjá kvinnum. Fyri fyrstu ferð nakran tíð hava kollfjarðarkvinnurnar hetta kappingarárið roynt seg í meistaradeildini hjá kvinnum, men fram til sunnudagin hevði úrtøkan tó verið so sum so. Fleiri ferðir hevur liðið tó sýnt góð avrik, men hetta hevur ikki rokkið til stig. Altso ikki fyrr enn sunnudagin.



*KÍF vann botn- og grannauppgerðini móti Fleyr, og lyfti seg sostatt av niðasta sessinum í meistaradeildini hjá kvinnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

KÍF vísti nevnliga hesaferð, at tær so avgjørt hava tikið við læru í dystunum higartil, og tað var eingin ivi um, at nú skuldi tað vera hjá teimum. Snøgt sagt, so vóru tær nógv meira tendraðar enn Fleyr-kvinnurnar, og hesin stríðsviljin vísti seg eisini at gerast avgerandi.

Í fyrsta settinum fekk Fleyr valla fótin fyri seg, og tó at tær komu nærri, sum dysturin leið, so megnaðu tær ongan tíð veruliga at hótta sigurin hjá heimaliðnum.

Sum sagt, so lyfti sigurin KÍF av niðasta plássinum í deildini, sum ístøðain er í varðveitslu hjá Fleyr. Og mangt bendir á, at hetta eisini verður støðan, í øllum førum fram til grundspælið er av. Tað er í løtuni óhugsandi, at Fleyr skal taka stig frá nøkrum av hinum feløgunum í deildini, og tí er lítið hugaliga prátið um eina møguliga niðurflyting farið at ganga hjá havnarfelagnum. Ein støða, sum í mangar mátar vildi verið óhugsandi fyri fáum árum síðani, men sum kortini er veruleiki í dag.

SÍ-ÍF 0-3 (15-25, 20-25, 17-25)

# Ivaleysir fuglfirðingar

**ÍF lat ongan iva vera eftir, tá teir vunnu tryggan sigur í útidystinum móti SÍ**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eitt av allar sterkastu liðunum í flogbóltslandskappingini í fjør var SÍ. Meistaraheitið vunnu teir ikki, men leingi vóru teir væl við, og hartil eydnaðist teimum eisini at vinna steypafinaluna í dysti móti ÍF.

Og sørvingar hava aftur í ár eitt sterkt lið, men tað er tó ein munur á kortini. Tað er nevnliga so, at ÍF í ár tykist hava eitt lið, sum eingin kemur í nær námind av hvat styrki viðvíkjur.

Undan dystinum í Sørvági høvdu fuglfirðingarnir vunnið fimm dystir á rað, uttan at sett er tikið frá teimum, og sunnudagin kom so sætti sigurin.

Og tað var ongan tíð nakar ivi um, hvør parturin var hin stinnari. Frá fyrsta bóltinum vóru fuglfirðingar teir stinnaru, og tó at ferðin á spælinum ikki alla tíðina var hin sama, so var tað ikki stórvegis, sum heimamenninir kundu gera til tess at steðga reyða herinum.

Og spurningurin tykist í løtuni vera, hvørt nakar yvir høvur er førur fyri at gera nakað sum helst við ÍF. Á øllum plássum tykist liðið vera somikið sterkt, at veik punkt eru trupul at fáa eyga á, og tí fær liðið alla tíðina leikt sítt spæl, tó at leikararnir rotera á plássunum.

Enn er grundspælið tó ikki liðugt, og í endaspælinum fara stigini av álvara at telja, men sum sagt, so er í løtuni ilt at fáa eyga á nakran avbjóðara til væl koyrandi fuglfirðingarnar.




Skips Sosialurin
- TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK





**Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir**

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tíðindablaðið
Sosialurin Box 76 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis*

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

**Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982 ella e-mail:** *skipssosialurin@sosialurin.fo*

☐ *Tekst útgáva*
☐ *HTML útgava ( uttan útskrift )*
☐ *HTML útgáva ( við útskrift )*

Sosialurin